Røktar- og umlættingarheimið

*Lágargarður*

## Summarfrítíðar-avloysarir

Røktar- og Umlættingarheimið Lágargarður søkir eftir summarfrítíðaravloysarum í tíðini frá 1. juni til 31. august 2003 ella sambært nærri avtalu.

Fyri røktarstarvsfólk: Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar/sjúkrahjálparar.

Somuleiðis verður søkt eftir avloysarum fyri starvsfólki í køkinum: Økonoma og køksassistentar, umframt hjálparfólk til at avloysa tey ið koyra døgurða út til heimabúgvandi pensionistar, tískil er koyrikort neyðugt.

Lønin er sambært avtalu ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er til 25. mars 2003.

Skrivligar umsóknir við neyðugum prógvum skulu sendast til leiðaran á

**Lágargarði**
Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

## Kunngerð
### um uttangarðsútskiftingarfund í Klaksvík

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, sum seinast er broytt við lóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 2. apríl kl. 10.30 í býráðshúsinum í Klaksvík.

Til viðgerðar verður uttangarðsútskifting av Uppsalahaga.

Nevndarlimir eru: Heri Samuelsen, Miðvágur og Kinna Olsen, Rituvík.

Tórshavn, tann 6. mars 2003

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

Landsfelag Pensjónistanna

## Ferðatilboð

Landsfelagið sigur frá, at Pensjónistafelagið í Vági, ger útferð til Aalborg tann 8. august.

Fólk ið hava áhuga í hesum kunnu ringja til ávíkavist Solveig Strøm á tlf. 373032 ella Niclas A. Poulsen tlf. 373829.

**Landsfelag Pensjónistanna**

Dámar tær væl
at fáast við hár ella smyrsl
- so er hettar kanska
nakað fyri teg.

Skúlin tekur bara 2 ár.
Tú er vælkomin at senda
eina umsókn sum skjótast.



Tann Føroyski
Hárfríðkanarskúlin
Postboks 1047
FO-110 Tórshavn
Tel. 262537 ella
Tel. 311683 eftir kl. 20.00

Sosialurin 311820

— vit flyta fyri virkir, stovnar og privat —

FAROE TRANS
Vøruflutningur
50 69 69
e-mail: faroetrans@email.com
Sosialurin 311820

— *Ring og fá eitt gott tilboð* —

Kollafjarðar Bjargingarfelag

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður í húsum felagsins leygardagin 22.03.03. kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

## Konfirmatións-klæðir til hansara



*fáast í*

**Kallkyn** Vágsbotnur Tel. 31 62 06

## Eldrafelagið Nón, Saltangará

Aðalfundurin sum varð lýstur at vera 11. mars er útsettur til 18. mars kl. 19.30.

**Eldrafelagið Nón, Saltangará**

## Hús í Vági til sølu

Um hóskandi boð fæst eru húsini matr. nr. 221b, sum eru gomlu HF-húsini, til sølu.

Send skrivlig boð til Jóhan Augustinussen, 900 Vágur ella ring 373843.

**Arbeiðsmannafelagið Framtíðin**

## Jørð í Sandavági til sølu

Um hóskandi boð fæst er matr. nr. 168 og 164 við ástandandi summarhúsi til sølu. Samlað vídd er 33.435 m$^2$.

**Tlf. 424155**

Klænari restina av lívinum!
harmoni

· Et teg mettan
· Óneyðugt at telja kaloriur
· Betri heilsa og vælvera
· Væl skjalprógvað skrá

Óbindandi upplýsingarfundir:

Hotel Vágar
Týsdagin 11.03.03 kl.19.00

Runavíkar Sjómansheim
Mikudagin 12.03.03 kl.19.00

Klaksvíkar Sjómansheim
Hósdagin 13.03.03 kl.19.00

Fyri meira kunning:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ása Joensen | 31 26 70 | Kaja Toftegaard | 44 44 29 far 22 02 59 |
| Karin Olsen | 45 63 56 | Álvur Joensen | 44 10 75 |

-Best eftir kl. 18.00

## Frá Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag

Aðalfundur felagsins verður sunnudagin 23. mars kl. 15.00 á Hotel Tvøroyri.

**Nevndin**



Søkt verður eftir

## LÆRLINGI Í SALTANGARÁ

at byrja sum skjótast

**Læran umfatar:** Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði

**Vit vænta:** at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. mars 2003

Sendast til:

P/F Hjá Fróða

Yviri við Strond 3 · Postboks 1336 · FO-110 Tórshavn
tel 310808 · fax 314676 · frode@post.olivant.fo · www.hjafroda.fo

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

## Diplomleiðara útbúgving

Nú verður møguligt at taka eina styttri leiðsluútbúgving í Føroyum. Talan er um Diplomleiðaraútbúgvingina, sum **Skeiðsdepilin við Marknagil** fer undir.

**Útbúgvingin tekur 2 ár, og treytað av undirtøku verður byrjað 27. mars 2003.**
Frálæran fer fram sum eitt tvey daga skeið, 5 ferðir hvørt hálva ár. Talan er um eina útbúgving, sum leggur dent á praktiskar og brúksrættaðar leiðsluførleikar.

Diplomleiðaraútbúgvingin er væl kend, eitt nú í Danmark, har fleiri av handilsskúlunum bjóða hesa útbúgving út. Útbúgvingin verður roknað sum ein góð barlast hjá leiðarum. Serliga hjá teimum, sum hava arbeitt við leiðslu, men ikki hava nomið sær útbúgving innan starvsfólkaleiðslu.

**Tilmelding: Í seinasta lagi 18. mars 2003, pláss er fyri 22 fólkum.**

Tilmeldingarblað fæst við at venda sær til

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur dt@hsh.fo

## Búmerkjakapping

**Tofta Arbeiðarafelag skipar fyri búmerkjakapping.**

Búmerkið skal ímynda virksemi felagsins, men nevndin setir annars ikki krøv til skap ella litir á búmerkinum.

**Virðislønir verða latnar fyri 3 tey bestu uppskotini:**

1. virðisløn kr. 5.000,-
2. virðisløn kr. 3.000,-
3. virðisløn kr. 2.000,-

Uppskotini skulu sendast inn í afturlatnum brævbjálva við frámerki, saman við brævbjálva við sama frámerki við navninum á innsendaranum.

Nevndin í Tofta Arbeiðarafelag velir tað besta uppskotið, men skilar sær eisini rætt til ikki at velja nakað uppskot.

Uppskotini skulu sendast til:
**Tofta Arbeiðarafelag**
**650 Toftir**

Freistin at lata uppskot til búmerki inn er 26. mars 2003

## Roknskaparleiðari

Til eitt handilsvirki við høvuðssæti í Tórshavn verður søkt eftir einum roknskaparleiðara. Í bókhaldinum starvast frammanundan tvey fólk, men tørvur er á einum fólki afturat at standa fyri roknskapardeildini.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhalds- og roknskaparabeiði og aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum hoyra hesum til.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og roknskap og vera førur fyri sjálvstøðugt at leiða arbeiðið. Praktiskar royndir frá vinnulívinum eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe (Joen Magnus Lamhauge).

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. mars 2003.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 351700
Fax (+298) 351701
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo

Sosialurin

## Skrivstovufólk søkjast til SEV

Eitt fulltíðarsstarv og eitt hálvdagsstarv sum skrivstovufólk hjá SEV í Havn er leyst at søkja.

**Starvið:**
Størvini eru á skrivstovuni hjá SEV í Havn. Fulltíðarstarvið umfatar í samstarvi við onnur skrivstovufólk at røkja ymiskar skrivstovuuppgávur, herundir at passa telefonvekslara og veita kundatænastu.

Hálvtíðarstarvið umfatar at passa telefonvekslaraskipanina hvønn dag frá kl. 9.00 til kl. 13.00. (20/37 av fulltíðarstarvi).

**Útbúgving:**
Ynskiligt er, at umsøkjararnir til fulltíðarstarvið hava skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving/ arbeiðsroyndir.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjararnir skulu hava góðar førleikar, bæði í skrift og talu, í føroyskum og donskum. Harafturat skal viðkomandi kunna føra samtalur á enskum, við tað, at ofta hevur SEV samskifti við fólk, ið ikki duga føroyskt og danskt.

Ein partur av kundatænastu og kundaviðgerð hongur neyvt saman við debitorbókhaldinum. Tí er tað ein fyrimunur, at umsøkjararnir til fulltíðarstarvið hava kunnleika til bókhald og teldubókhaldsskipanir.

Góð samstarvsevni krevjast við tað, at flestu arbeiðsuppgávurnar verða loystar í samstarvi við onnur, og skal viðkomandi vera til reiðar at átaka sær fyrifallandi smærri praktiskar uppgávur, sum hoyra skrivstovuni til, men sum kanska ikki í øllum førum kann bólkast beinleiðis sum skrivstovuarbeiði.

**Lønin:**
Fulltíðarstarvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsroyndum og verður flokkað í II. ella III. lønarflokki.

Hálvdagsstarvið verður lønt eftir útbúgving og royndum í I. ella II. lønarflokki.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Postrúm 319, 110 Tórshavn, og skulu sær vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 24. mars 2003.

Í umsóknini skal tilskilast, um viðkomandi søkir fulltíðarstarv ella hálvdagsstarv ella bæði. Um bæði verða søkt, skal tilskilast, hvat umsøkjarin leggur størri dent á.

Teir umsøkjarar, sum eisini søktu skrivstovustarv hjá SEV í Havn seinastu tríggjar vikurnar, hava ikki tørv á at senda nýggja umsókn, men verða givnir møguleika at fáa umsóknina við í hesi fyrireikingarnar. Fáa teir bert siga frá, hvat starv verður søkt og annars vísa til áður innsendu umsókn.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til John P. Danielsen á tlf. 346800.

Tórshavn, tann 6. mars 2003

**Elfelagið SEV**